Ráðstevnan Børn á Breddan

BØRN Á BREDDAN

# Barnalív skapa vit í felag

Ráðstevnan vendir sær til tykkum, ið arbeiða á smábarnaøkinum, politikarar og onnur, ið geva evninum ans.

## Skrá

### MORGUNMATUR

**Týdningurin hjá dagstovnum**
Brenda Taggert (UK). Hon granskar í, hvønn týdning dagstovnar hava fyri at stuðla børnum til tað góða lívið. Við støði í gransking fer hon á einfaldan hátt at greiða frá, hvat eyðkennir góða góðsku á dagstovnum.

**„Oppsporing og underretning i dagtilbud"**
Kirsten Elisa Petersen (DK) - DPU Danmarks institut for Pædagogik og Uddannelse. Evnið er vorðið ein alsamt størri partur av námsfrøðiliga arbeiðinum. Hon fer at viðgera evnið við støði í bók, ið hon hevur skrivað saman við øðrum.

**TÍTT – amboð til metingar av trivnaðinum hjá børnum**
Anja Clementsen (FO) - námsfrøðiligur ráðgevi í Runavíkar kommunu. Sum ráðgevi á dagstovnaøkinum er hon helst tann við hollastu royndunum í Føroyum at fáa TÍTT framt í verki.

**Rættindi til ADHD/ADD**
Bjørg Dam (FO) – forkvinna í ADHD-felagnum. Hon fer at hugleiða um, hvat tað hevur at siga, at ADHD verður staðfest so tíðliga í lívinum sum til ber. Harumframt at viðkomandi leikluturin hjá foreldrum verður tikin við í tilgongdina frá fyrsta degi, tá ið ein varnast, at okkurt er á vási.

### MIÐMÁLI

**Byrjanarsamrøðan**
Jóhanna Andreasen (FO) – kveikjari. Byrjanarsamrøðan er viðkomandi og skipað samrøða við foreldrini, tá ið barnið byrjar á stovni. Endamálið er at fáa gott samband við foreldrini í friðartíð.

**Lívsmeistran í barnagarðinum**
Line Melvold (NO) - mastergrad i barnehage- og profesjonsutvikling. Sálarlig heilsufremjan verður sett á skrá. Hon fer at vísa á, hvat starvsfólk á økjunum kunnu gera fyri at økja um lívsdygdina við at gera væl grundaðar raðfestingar og burðardygg námsfrøðilig val.

**„Alt det forældre kan"**
Rasmus Alenkær (DK) – sálarfrøðingur, rithøvundur og fyrilestrarhaldari. Fokus er á, hvat foreldur kunnu gera, tá ið ruðuleiki og mótstøða skulu broytast til samljóð og samstarv í familjuni.

### SEINNAPARTSDREKKAMUNNUR



**23. sep. 2021**
08.30–16.00 á Hotel Føroyum

**Tilmelding**
www.atgongumerki.fo.
Freistin at boða frá luttøku er 5. sep. 2021.

Kommunufelagið